Nordisk Netværk for
Voksnes Læring

CC BY-SA 4.0

# 5 tilmæli um talgilda inklusjón

Norðurlendskt netverk fyri vaksnamannalæring (NVL) vísir við hesum á fimm tilmæli, ið eru við til at menna talgildu førleikarnar hjá tilkomnum borgarum.

1



## Staðfest verður, at talgildingin er allastaðni í samfelagnum

Grundleggjandi talgildir førleikar eru neyðugir, um borgarin skal kunna virka og flyta seg í samfelagnum. Tað snýr seg ikki um, at borgarin hevur serstakar talgildar avbjóðingar. Tað snýr seg um, at talgilda samfelagið setir borgaranum krøv um førleikar.

**NVL mælir politikkmyndarum til:**

- Ikki at síggja einstaka borgaran sum "trupulleikan", men sum "loysnina"
- Ikki at síggja einstaklingin, sum um tað er hann, ið hevur serstakar talgildar avbjóðingar, men at síggja tann gjøgnumseyrandi streymin av talgilding sum áhaldandi avbjóðing fyri tann einstaka.

2



## Staðfest verður, at talgildingin myndar gerandisdagin

Tað er ein trupulleiki, tá borgarin ikki megnar at útinna og loysa gerandisuppgávur, tí talgildingin forðar fyri hesum. Gerandisuppgávur – stórar og smáar – eru við til at fremja talgilda útihýsing.

3



## At skapa liðiligar karmar fyri luttøku

'Ein-stødd-sum-passar-øllum' er eingin loysn. Ymiskir bólkar av borgarum hava ymisk sløg av avbjóðingum, eitt nú treytað av útbúgvingarstigi, mentan, verandi førleikum, evnum o.s.fr.

4



## At skapa sambond millum borgaran og viðkomandi tænastuveitarar

Ein ætlan verður løgd, saman við tí einstaka, við tí fyri eyga, at avbjóðingar og ivamál verða loyst á besta hátt, og at samstarvað verður millum áhugapartar og tvørtur um samfelagsgeirar.

5



## At knýta í tað, sum hevur týdning fyri borgaran

Avbjóðingar og tørvir hjá borgaranum skulu eyðmerkjast, so at til ber at nágreina tær einstøku forðingarnar og avbjóðingarnar, sum vinnast skal á, so endamál og týdningur gerast sjónlig fyri tann einstaka.

### Um Norðurlendskt Netverk fyri Vaksnamannalæring (NVL) og netverkið NVL Digital

NVL Digital arbeiðir við at eyðmerkja avbjóðingar og at menna felags norðurlendskar loysnir, sum stuðla undir læring fyri øll í eini alsamt øktari talgildan av samfelagnum.

NVL virkar fyri sosialt burðardyggum Norðurlondum, har vit leggja dent á eitt inkluderandi, javnlíkt og samanhangandi norðurlendskt øki.

Les meira her: *nvl.org/nvl-digital-inklusion*